# Kappingarráðið góðkent samanlegging

Kappingarráðið hevur tikið endaliga avgerð í málinum um samanlegging av Dimmalætting og Vinnuvitan. Í samband við samanleggingina er gjørdur ein keypssáttmáli millum partarnar, sum m.a. inniheldur ávísar kappingarklausular. Kappingarráðið metir hesar klausular verða ov stórt inntriv í framtíðar kappingina, tí hevur Kappingarráðið sett sum treyt fyri at góðkenna samanlegginina av fyritøkunum, at kappingarklausulurin í keypssátmálanum verður styttur úr trimum árum niður í tvey ár. Áðrenn endaligu samanleggingina, skal kappingareftirlitið hava váttan fyri, at kappingarklausulurin er broyttur smb. avgerðina, og ta váttanina hevur Kappingarráðið fingið, og kappingarklausulurin er broyttur samsvarandi Samanleggingin av Dimmalætting og Vinnuvitan er sostætt endaliga góðkend, sigur Kappingareftirlitið.

# Norrøna framgongd men oljan nívir




*Fleiri sigla við Norrønu, men tann dýra oljan tyngir raksturin*

**Nú ferðast næstan líka nógvir týskarar sum føroyingar við Norrønu, men oljuprísurin er ein avbjóðing fyri raksturin**

FERÐAVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tey, sum hava siglt við Norrønu, munnu hava varnast, at tað er longri ímillum tey føroysku ferðafólkini umborð, meðan tey fremmandu tykjast tilsvarandi fleiri. Og so er.

Tá gamla Norrøna sigldi, vóru heili 70 prosent av ferðafólkunum føroyingar, men tann myndin er nógv broytt, síðani tann nýggja Norrøna kom. Tey føroysku ferðafólkini eru líka mong sum tá, men minni partur av heildini, tí tað nýggja skipið tekur munandi fleiri fólk. Tað eru fremmandafólk, sum hava fylt plássið, sum er komið afturat, og tey seinastu tølini vísa, at nú sigla næstan líka nógvir týskarar og føroyingar við Norrønu.



*Jákup Sverri Kass er marknaðarstjóri hjá Smyril Line*

Ein uppgerð frá 22. juli vísir, at teir seinastu tólv mánaðirnar vóru 25 prosent av ferðafólkunum við Norrønu føroyingar, og at tann týski parturin var 21,7 prosent. Næstir týskarunum koma danir við 13,5 prosentum, síðani norðmenn við 10,6 prosentum, íslendingar við 5,8 prosentum,og tey seinastu 23,3 prosentini av ferðafólkunum eru úr øðrum londum.

### Ísland minkar

Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari á Smyril Line, sigur, at Norrøna hevur havt framgongd á øllum marknaðunum uttan tí íslendska, og at tann føroyski marknaðurin stendur í stað.

Av ferðaseðlunum, sum eru seldir teir seinastu tólv mánaðirnar, eru 5,8 prosent seldir í Íslandi. Tað er minni enn teir tólv mánaðirnar frammanundan, tí tá átti Ísland 7,9 prosent av ferðaseðlunum.

- Vit skulu hava í huga, at 2007 var metár hjá Norrønu í Íslandi, so í veruleikanum er ikki talan um stórvegis afturgongd, sigur Jákup Sverri Kass.

Umrsøkinatilafturgongdina í Íslandi sigur marknaðarstjórin, at hon kemst uttan iva av teimum ótryggu búskaparviðurskiftunum í Íslandi. Tað hevur eisini víst seg, at aðrar farleiðir hava kent sama sviðan sum Smyril Line. Hinvegin kann hann fegnast um, at meðan onnur ferjureiðarí, sum sigla upp á Bergen, hava havt afturgongd har, hevur Smyril Line havt munagóða framgongd á Bergen-rutuni.

### Scrabster

Í fjør gjørdi leiðslan í Smyril Line av at strika Lerwick úr ferðaætlanini hjá Norrønu og at lata skipið sigla upp á Scrabster í Norðurskotlandi ístaðin fyri.

Jákup Sverri Kass sigur, at enn er ov tíðliga at siga, hvussu tann nýggja rutan fer at roynast, men at tølini vísa stóra framgongd samanborið við siglingina til Lerwick.

Hetta kemst fyri ein part av, at Smyril Line hevur lagt seg eftir at fáa ferðafólk av meginlandinum at koyra til Scrabster heldur enn Hanstholm. Fyrimunurin er, at Norrøna er ofta full á Hanstholm-rutuni, og harafturat er tað bíligari fyri ferðafólkini at sigla úr Scrabster heldur enn Hanstholm.

### Oljan

Tann høgi oljuprísurin hevur stóra ávirkan á raksturin hjá einum ferðamannaskipi sum Norrønu, og tí hevur reiðaríið lagt seg eftir at spara mest møguliga olju.

Jákup Sverri Kass sigur, at tað hevur gingið væl hjá Norrønu at halda tíðina, og seinkingar hava ikki verið. Tað hevur gjørt, at skipið kann halda eina meiri javna ferð og á tann hátt spara olju. Men tað er eisini neyðugt.

- Vit hava eina avmarkaða fíggjarætlan. Oljan hevur sera stóra ávirkan á útreiðslurnar og er ein avbjóðing, sigur marknaðarstjórin á Smyril Line. Hann vísir á, at tá tey í mei í fjør ásettu prísirnar á ferðaseðlunum fyri summarið 2008, var oljuprísurin helvtina av tí, sum hann er í dag.

*- Merkir tað, at ferðaseðlarnir fara upp næsta summar?*

-Tað er ov tíðliga at siga enn.

## Tað almenna má stuðla

Tann ótrygga búskaparstøðan í Íslandi hevur havt við sær, at íslendingar ferðast ikki so nógv, sum teir gjørdu í fjør. Jónas Hallgrímsson, sum er umboðsmaður hjá Norrønu í Íslandi og nevndarlimur og partaeigari í Smyril Line, segði við íslendska kringvarpið herfyri, tað er týðiligt, at tey versnandi búskaparviðurskiftini hava fingið nógvar íslendingar at missa ferðahugin.

Jónas Hallgrímsson segði, at tann høgi oljuprísurin er komin nógvum fyritøkum í ferðavinnuni illa við, og at ferðavinnan tolir ikki, at tann prísurin verður varandi.

- Eg skilji ikki, at myndugleikarnir ikki leggja uppí, áðrenn tað er ov seint, segði Jónas Hallgrímsson við Ríkisútvarpið.